From: Javnstøðunevndin <javnstoda@javnstoda.fo>
Sent: fríggjadagur, 28. november 2025 15:07
To: Hallur Markná <hallurm@logting.fo>
Subject: Tilfar til kunningar, LM-048/2025

Til Mentanarnevnd Løgtingsins.

Víst verður til fund í Mentanarnevndini um lógaruppskot um javnseting av øðrum ansingarloysnum við kommunalu ansingarstovnarnar tann 26. novembur 2025 (LM-048/2025).

Á fundinum varð sipað til finska granskingarverkætlan um ymsar ansingarloysnir og avleiðingar. Viðfest sum pdf-skjal eru kanningarúrslitini í einari sokallaðari 'working paper'-útgávu frá februar 2023.

Javnstøðunevndin hevði upprunaliga mælt til at lesa kanningarúrslitini í vísindagrein við heitinum *Paying moms to stay home: Short and long run effects on parents and children*, ið varð útgivin í vísindaritinum Journal of Public Economics í novembur 2025, men tíverri hevur enn ikki eydnast javnstøðunevndini at fáa fulla atgongd ta útgávuna.

Viðfest er eisini grein frá heimasíðuni hjá danska fakfelagnum BUPL frá februar 2024, ið umrøður somu kanningarúrslitini.

Javnstøðunevndin hevur víst á nevndu granskingina sum dømi um býtið av heimaansing og onnur ansingartilboð og tess avleiðingar, tí støðan í Finnlandi er serliga áhugaverd. Sum viðfesta tilfarið vísur á, letur til at góðskan á barnaansingini, bæði tá tað ræður um heimaansing og dagstovnatilboð, er avgerandi fyri kanningarúrslitini.

Vegna javnstøðunevndina

Vinarliga

Brandur Mortensen Nolsøe
Skrivari

Javnstøðu nevndin

Gender Equality Commission
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands

brandur@ammr.fo • javnstoda@javnstoda.fo